# Meistarin vinnur oftast í Klaksvík



*Einasti kiksarin mundi vera, tá streymurin fór, so ongar tíðir vóru til 8-mannaførini. Tað seinkaði avgerðini nakað, og her síggjast teir á Nevinum Reyða bíða í spenningi*

*Mynd: Bárður*

**Talan var um fyrireikingarligt plettskot, tá ið fyrsta FM kappingin leygardagin varð í Klaksvík, har teir fingu staðfest, hvussu stóran týdning tað hevur, at alt er klárt, tá ið tað skal vera klárt**

FM KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Í bestu róðrarlíkindum - lítið høgættarlot og klárt veður - var ársins fyrsta FM stevna í kappróðri í Klaksvík leygardagin.

Í hesum próvtøkutíðum greiddu lokalu fyrireikararnir sína uppgávu fram ímóti UG. Teir vóru so væl fyrireikaðir, sum tað ber til at vera. Startskotið til fyrsta róðurin gelti, tá ið klokkan var trý, og tað kom fleiri ferðir fyri, at bátarnir og startdómarin bíðaðu eftir, at bátarnir, sum skuldu fylgja við í róðrunum, komu út aftur á málið.

Hesin veruleikin - at kappróðurin loksins hevur funnið fram til, hvussu týdningarmikið tað er at halda seg til avráddu tíðina - fer ivaleyst at smitta til allar hinar stevnurnar. Tað hevði í hvussu so er verið gagnligt fyri rógvararnar, stevnufyrireikararnar og ikki minst áskoðararnar og lurtararnar kring landið.

Okkurt hendinga óhapp var undir róðrinum, men tað var sovorðið, sum tað ikki kann byrgjast uppfyri.

## Ofta tann sami

Í kappróðrarprátinum eftir róðurin á Norðoyastevnu hava summi tikið til, at tann, sum vinnur á Norðoyastevnu, verður sum oftast meistari, meðan onnur hava sagt tað beint øvugta, altso at tann, sum vinnur í Klaksvík, verður ikki meistari.

Hagtølini seinastu fimm árini staðfesta, at tað kemur næstan ikki fyri, at annar bátur enn tann, sum vinnur á Norðoyastevnu, verður meistari. Í kappingini millum 10-mannaførini er tað ikki komið fyri.

- Undan Ólavsøkuni í fjør lógu vit til at vinna meistaraskapin. Havnarbáturin vann á Ólavsøku, og hann gjørdist meistari. Hann hevði vunnið á Norðoyastevnu. Um vit høvdu havt vunnið í Klaksvík, so høvdu vit ikki havt mist FM heitið, hóast vit ikki høvdu havt vunnið á Ólavsøku, sigur bátsformaðurin á Nólsoyingi, Nicolaj Falck.

Hesa ferð eydnaðist tað Nólsoyingi at vinna í Klaksvík. Hetta var fyrsti sigurin hjá teimum har norðuri síðani í 1989.

- Tað árið vann Nólsoyingar FM. Tað hevur hann ikki gjørt síðani. Nú hava vit aftur vunnið á Norðoyastevnu. Vit ætla okkum at vinna FM. Vit eru greiðir yvir, at tað verður hørð kapping, men sigurin í Klaksvík er gott grundarlag hjá okkum at kappast víðari á, heldur formaðurin á Nólsoyinginum.

Í kappingini millum 8-mannaførini er tað bara komið fyri í 2002, at tað ikki hevur verið sami vinnari á Norðoyastevnu og í FM. Ta ferðina vann Argjabáturin á Norðoyastevnu, meðan Kvívíkingur varð meistari.

Í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum er tað ongantíð komið fyri seinastu fimm árini, at annar bátur enn tann, sum vann í Klaksvík, er vorðin meistari. Í kappingunum millum 5-mannafør við bæði dreingjum og gentum og í kappingini millum 6-mannafør við monnum er tað tvær ferðir komið fyri, at annar bátur hevur vunnið á Norðoyastevnu enn tann, sum seinni gjørdist meistari.

# Suðurstreymoy fekk alt skreytið

**Havnar Róðrarfelag fór við tveimum og tey á Argjum við einum setti av heiðurskrónum**

NORÐOYASTEVNA 5-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*

Bestu kappróðrarkvinnurnar eru tær í Suðurstreymi. Jarnbardur prógvaði enn eina ferð á Norðoyastevnu, at tær eru framúr,og í kappingini ímillum kvinnurnar umborð á 5-mannaførunum var tað ikki so nógv øðrvísi.

Sílið stóð seg framúr væl. Kvinnurnar vóru tvær bátslongdir undan næstu kappingarneytunum, og tað var hin kvinnubáturin hjá Havnar Róðrarfelag, Drekin, sum var næstfyrstur á mál. Honum á baki kom Blikur hjá Argja Róðrarfelag á mál. Munurin millum nummar tvey og trý var ógvuliga lítil. Eina bátslongd aftanfyri Blik komu Firvaldur og Fípan Fagra mest sum í senn á mál.

Høvdu tit roknað við hesum úrslitinum?

Arndis Andreasen er bátsformaður á Sílinum, og hon svarar soleiðis:

- Á Strondum vunnu vit. Tá var frástøðan til Blik seks sekund, og til Drekan, sum endaði á fjórða plássinum, var munurin ta ferðina trettan sekund. Men eitt er bygdarstevna, og nakað annað er tað, tá ið tað er álvari í FM kappingini. Men vit eru sera fegnar um, at tað gekk so væl í Klaksvík.

Hava tit undir venjing kappast ímóti Drekanum?

- Yvirhøvur ikki. Tí var hetta rættuliga spennandi. Vit fingu góðan start, og tað var skjótt, at vit fingu at vita, at tað sá heilt gott út. Men vit kendu ikki, at vit høvdu vunnið, fyrrenn vit vóru komnar á mál.

Kvinnurnar umborð á Sílinum eru 20-22 ára gamlar. Flestu teirra hava nógvar royndir í kappróðri. Bátsformaðurin er saman við Annu Høgnesen triðja árið umborð á Sílinum. Fríða Rasmussen og Torgunn Gásdal vóru eisini við í fjør. Tríggjar nýggjar eru komnar við. Sólvá Dam hevur ongantíð róð áður. Magna í Stórustovu hevur áður róð við Sílinum og Gongurólvi, og Linda hevur áður róð við Havfrúnni í Vestmanna.



*Sílið legði seg skjótt nakað undan hinum bátunum, og tann munin hildu tær allan vegin*

*Mynd: Bárður*

**Úrslit: 5-mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 05:16.13 |
| 2 | Drekin | 05:22.03 |
| 3 | Blikur | 05:22.14 |
| 4 | Firvaldur | 05:25.13 |
| 5 | Fípan Fagra | 05:25.14 |
| 6 | Frúgvin | 05:26.20 |
| 7 | Junkarin | 05:30.11 |
| 8 | Royndin Fríða | 05:30.23 |
| 9 | Ritan | 05:31.17 |
| 10 | Ørnin | 05:33.01 |
| 11 | Falkur | 05:41.01 |